# Førleikamenning, drukk og demens

**Felagið Synergi hevur trý sera áhugaverd skeið á skránni komandi tíðina**

SKEIÐ
*Tíðindaskriv*

### Tá foreldrini drekka

Arbeiðir tú dagliga við børnum og ungum, og hevur varhugan av, at nøkur av "tínum" børnum hava tað ringt heima, orsakað av at annað ella bæði foreldrini eru alkoholikarar? Skalt tú bara lata sum luft, ella skalt tú "blanda" teg? - Skeið fyri pedagogar, lærarar, ítróttarleiðarar og onnur sum dagliga eru um børn og ung í Føroyum. Kostnaður kr. 1.650,- íroknað fullan kost. Tilmeldingarfreist 1. apríl.

### DEMENS - Betri lívsgóðsku við Minnisvirksemi

Flestu teirra, sum arbeiða innan eldraøkið, kenna tað aftur, at tosa um gamlar dagar við tey gomlu. Men dugir tú at brúka háttin tilætlað og sum ein virknan leiklut í arbeiðinum? Hetta er eitt 2-daga skeið fyri starvsfólkum, sum øllum teimum sum arbeiða innan Eldraforsorgina. Kostnaður kr. 2.550,- íroknað fullan kost. Tilmeldingarfreist 4. apríl.

### Grundútbúgving í Supervisión

í Føroyum, samstarv við Den Sociale Højskole í Keypmannahavn. - Kundi tú hugsað tær, at Supervisión var ein fastur og náttúrligur partur av arbeiðinum? Kundi tú hugsað tær at verið tann, ið fekk Supervisión í lag, á tínum arbeiðsplássi? Hetta er ein útbúgving, sum er fyri fólk í arbeiða við menniskjum. Kostnaður kr. 15.880,- íroknað fullan kost í 14 dagar. Max. 20 luttakarar. Tilmeldingarfreist 12. apríl.

Vilt tú vita meira, so vitja heimasíðuna hjá Synergi - www.synergi.fo - tað loysir seg!

## HEILSANIR



**Góða Heidi**
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum.
**Ynskja Tyttomma og abbi**



**Góða elskaða mamma**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum í dag.
Bestu heilsur frá okkum øllum.
**Frank Ingi**



**Góði Martin**
Lukku og gleði á tínum 6 ára degi tann 30. mars
Vit gleða okkum at koma í føðingardag hjá tær. Muss og klemm
**Heilsan omma og abbi á Norðasta Horn**



**Góði Allan**
Hjartaliga tillukku á 6 ára føðingardegnum.
**Ynskja langomma og Olla**

# Fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

(MYND: Bárður Niclasen, setast til)



FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Sjeyndi og næst seinasti fyrilesturin í røðini "Myndlar og tøl", sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri, verður hóskvøldið 31. mars, tá ið Bárður A. Niclasen, Ph.D-studentur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum heldur fyrilesturin "Spæla alda og streymur saman á landgrunninum". Fyrilesturin verður klokkan 20 í Ovastovu í Nóatúni 3.

Flestu føroyingar munnu vita, at ikki bert vindurin, men eisini sjóvarfalsráki ávirkar alduna. Elias Davidsen sáli, sum varð tann fyrsti, ið av álvara fór at kanna alduviðurskiftini við Føroyar, skrivaði einaferð soleiðis: "Tað er ikki møguligt at práta við ein føroying um bylgjur uttan samstundis at tosa um streym. Um tú tosar um bylgjur, so tosar hann um streym."

Aldumátingar hava verði gjørdar við Føroyar seinastu 25 árini, og verða dagliga lisnar upp í útvarpinum. Hesar mátingar vóru í fyrstuni gjørdar fyri at geva útróðrarmonnum betri upplýsingar um aldustøðuna. Hesar mátingar eru nú sum frálíður vorðnar grundarlagi undir vitanini um aldur og alduviðurskifti við Føroyar.

Í dag er møguligt við numeriskum modellum at spáa um alduvánir, á sama hátt sum veðurfrøðingar spáa um veðri. Við hjálp av einum slíkum aldu modelli verður í løtuni kanna hvussu sjóvarfalli ávikrar alduvánirnar við Føroyar.

Í fyrilestrinum verður tosað um ávirkanina sum sjóvarfalsstreymur hevur á alduna. Dømi verða tikin úr aldumátingunum við Føroyar, og modellroyndir fyri føroyaleiðina verða vístar.

Bárður A. Niclasen er útbúgvin cand.scient í jarðalisfrøði frá Københavns Universitet. Hann fór í 2002 undir Ph.D. lestur innan havfrøði á Náttúruvísindadeildini, Fróðskaparsetri Føroya.

Ph.D. lesturin er fíggjaður av Statoil-bólkinum sum partur av teirra játtan til førleikamenning í Føroyum.


30,- kr. Sosialurin

## Heilsanir

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á mikudegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .......................................................................
Bústaður: ..................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**